UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **6. apríl 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-91**

Svar

upp á

skrivligan § 52a fyrispurning nr. 52-155/2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum, um skapandi fyrireikingarbreyt á Glasi.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Við hvørjum treytum hevur landsstýrismaðurin góðkent skapandi fyrireikingarbreytina á Glasi?
2. Er 18 ára aldursmarkið, ið treytar upptøku á fyrireikingarbreyt, broytt fyri alla fyrireikingarbreytina, ella er hetta bara galdandi fyri skapandi breytina?
3. Er námsætlanin fyri handaliga partin nýggj ella partur av verandi útbúgvingarskipan og um ja, hvørjari?
4. Er útbúgvingin góðkend sum atgongd til víðari lestur so sum design, námsfrøði og læraraútbúgving?
5. Nær er søkt um at fáa útbúgvingina og nær er útbúgvingin góðkend av landsstýrismanninum?
6. Er meting gjørd av tørvinum á nýggju útbúgvingini?
7. Er ætlan um at endurskoða og dagføra breytaskipanina?
8. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at skipa fleiri nýggjar útbúgvingar á øðrum miðnámsskúlum?

Svar

Til 1: Royndarvirksemi er góðkent við heimild í § 37 í løgtingslóg nr. 62 frá 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 18. desember 2015. Svarskriv er sent Glasi við treytum um:

- Námsætlanir, próvtøkuleist, próvsnið, fígging innan egið virksemi, upptøku, eftirmetingarleist, undirtøku og fráboðan.

Harumframt hevur Glasir eftir áheitan frá Undirvísingarstýrinum framt ávísar rættingar í BU, Bv3 og lærugreinasamansetingini. Hetta fyri at tryggja, at talan er um fullfíggjað prógv frá fyrireikingarbreytini (HF). Heitt var á Undirvísingarstýrið at hava eftirlit við, at treytirnar, ið Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur sett Glasir, verða fylgdar.

Til 2: Í umsóknini verður biðið um frávik frá aldursmarkinum til Skapandi Fyrireikingarbreyt, og hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið játtað hesum, galdandi fyri hesa útbúgving.

Til 3: Yrkisparturin er samansettur av pørtum av yrkislærugreinum frá útbúgvingunum innan Tilvirkisatstøði og Klædnaatstøði, og tær fylgja hesum námsætlanum.

Til 4: Skapandi fyrireikingarbreytin er góðkend sum atgongd til hægri lestur, á sama støði sum fyrireikingarbreytin annars. Hesir næmingar fáa fult prógv, sum gevur somu møguleikar, sum eitt vanligt prógv frá vanligu Fyrireikingarbreytini. Hvørt næmingar annars lúka upptøkukrøv til onkra serstaka útbúgving, kann stundum eisini verða ein spurningur um serstøk upptøkukrøv, og ella vísandi til spurningin, um ta upptøkuroynd, ið er krav á summum hægri útbúgvingum innan sniðgeving.

Til 5: Umsókn frá Glasi um royndarverkætlan kom á fyrsta sinni til Uttanríkis- og mentamálaráðið tann 5. juli 2019. Síðani varð málið viðgjørt í Undirvísingarstýrinum og Uttanríkis- og mentamálaráðnum í samskifti við skúlan, og niðurstøðan var, at ávísar tillagingar skuldu gerast, og at Glasir skuldi venda aftur við dagførdari umsókn. Fundur millum partarnar var so aftur seint í heyst, áðrenn dagførd umsókn varð send. Seinna umsóknin er dagfest 15. desember 2021, og 20. desember 2021 tók Uttanríkis- og mentamálaráðið avgerð um at loyva skúlanum at fara undir hetta royndarvirksemi við einari skapandi breyt á sumri 2022, undir teimum treytunum, ið eru nevndar omanfyri, í svarinum til 1. spurning.

Til 6: Vit samskifta javnan við miðnámsskúlarnar um tilgongdina til ymisku útbúgvingarnar, og meta vit í tí sambandi eisini um tørvin á nýggjum útbúgvingum. Í hesum ítøkiliga føri mettu vit, at skapandi fyrireikingarbreytin á Glasir var ein áhugaverd royndarverkætlan, sum kundi geva møguleika fyri at ganga nýggjar leiðir, eisini í mun til tættari samstarv ímillum yrkisøkið og gymnasiala økið.

Til 7: Tað fyriliggur ikki nøkur ítøkilig ætlan um at endurskoða og dagføra breytaskipanina.

Til 8: Frá ymisku miðnámsskúlunum koma onkuntíð hugskot til nýggjar útbúgvingar, og viðgera vit tey so hvørt sum ítøkiligar umsóknir koma inn til ráðið. Eg kann í hesum sambandi leggja afturat, at umframt nýggju skapandi fyrireikingarbreytina á Glasir, verður í løtuni eisini fyrireikað ein alaraútbúgving í Vestmanna, og triði parturin av kokkaútbúgvingini á Tekniska Skúla í Klaksvík.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður